## Íslendskt dóttirfelag í Kina

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Íslendska framleiðslu- og sølufelagið, Icelandic Group, hevur stovnað eitt dóttirfelag í kinverska býnum, Qingdao.

Málið hjá felagnum er at innflyta rávørur og útflyta lidnar vørur, samstundis sum dóttirfelagið eisini fer at leita eftir samstarvshugaðum framleiðarum í Kina.

Íslendska felagið fer eisini at byggja víðari á tað samstarv, sum longu er millum íslendingar og kinverskar framleiðarar.

Í seinastuni hevur ljóðað, at eitt nú norðmenn senda fisk til Kina at framleiða. Fiskurin verður síðan seldur aftur á evropeiska marknaðinum við góðum vinningi og í kapping við annan fisk, tí arbeiðsorkan í Kina er so bílig.

### Bílig framleiðsla

Í samrøðu við Sosialin fyrr í ár, segði Sonny Johannesen, skipari á Ennibergi, at norsk reiðaríir, sum fiska eystanfyri, eisini senda heilan fisk til virkingar í Kina og selja hann aftur í kapping við eitt nú tann fiskin, sum føroysku flakatrolararnir veiða og framleiða.

Hugsandi er, at íslendska felagið, Icelandic Group, eisini hevur fingið eyguni upp fyri hesum møguleika í Kina.

Sosialurin hevur frætt frá álítandi keldu, at føroyingar eru ikki heilt ókendir við bíligu arbeiðsorkuna eystanfyri, tí onkur roynd er áður gjørd at senda eitt nú kongafisk til Kina at framleiða.

Vit hava eisini frætt, at tað var júst reiðarin á Ennibergi, Mortan Johannesen, sum stóð fyri hesi royndini.

# Funningur loypur ikki framav

**– Vit hava ongan hug at skunda okkum at leggja saman, nú bert hálvt ár er eftir av hesum valskeiðnum. Men tá ið ein møgulig samanlegging verður aktuell, ivist eg onga løtu í, at vit leggja saman við Runavíkar kommunu, sigur bygdarráðsformaðurin í Funningi, Jóan Petur Johannesen**



*Einki bendir á, at fólk í Funningi sleppa at taka støðu til nakra samanlegging fyri kommunuvalið í heyst. – Men tá ið tann tíðin kemur, ivist eg onga løtu í, at vit leggja saman við Runavíkar kommunu, sigur bygdarráðsformaðurin, Jóan Petur Johannesen*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

SAMANLEGGING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Trý fólk eru í bygdarráðnum í Funningi. Tey eru Jytta Juul, Álvur Reyðberg og formaðurin, Jóan Petur Johannesen.

Sum skilst, eru tey rættiliga samd um, at Funnings kommuna neyvan verður partur av aðrari kommunu longu, 1. januar 2005.

– Nú er bert eitt hálvt ár eftir av hesum valskeiðnum, og eg haldi ikki, okkum nýtist at skunda okkum. Tí er ikki hugsandi, at nøkur fólkaatkvøða verður í Funningi um møguliga samanlegging fyri valið, sum stundar til.

Jóan Petur Johannesen, bygdarráðsformaður í Funningi, ásannar, at hann fyri 1-2 árum síðan var heitur fyri samanlegging, men nú so nógv er útliðið, heldur hann, at Funnings kommuna saktans kann bíða við hesi avgerð til eftir valið í heyst.

– Tá ið eg var heitur fyri samanlegging, vóru ikki øll í bygdarráðnum samd um hetta. Nú haldi eg ikki, tað er rætt at skunda eina avgerð um samanlegging ígjøgnum, sigur hann.

### Velja Skálafjørðin

Jóan Petur ivast tó onga løtu í, hvønn veg Funnings kommuna velir at fara, tá ið tann tíðin kemur – og um hon kemur.

– Vit hava tosað nokso nógv við Runavíkar kommunu, og eg ivist onga løtu í, at verður lagt saman við aðrari kommunu, velja vit Skálafjørðin fram um Sundalagið.

Bygdarráðsformaðurin vísir á, at Runavíkar kommuna hevur drúgvar royndir við teimum smáu bygdunum, sum eru partur av kommununi, og hann væntar ikki, at Funnings kommuna í eini møguligari samanlegging verður forsømd á nakran hátt.

– Vit hava mark við Skála kommunu, og vit hava mark við Elduvíkar kommunu, sum báðar hava gjørt av at leggja saman við Runavíkar kommunu.

Jóan Petur vísir á, at teinurin út á Skálafjørðin er nakað longri enn teinurin vesturum til Sundalagið.

– Men tað er sléttur og beinur vegur inneftir Funningsfirði og úteftir Skálafjørðinum, so geografiskt passar hetta okkum væl.

Hann heldur, at tað tekur einar 10 minuttir longri tíð at koyra út á Skálafjørðin enn vestur um til Sundalagið.

### Skúlasamstarv

Jóan Petur sigur, at sum er, hevur Funnings kommuna samstarv við Elduvíkar kommunu um bátahylin í Funningsfirði, har kommunurnar báðar bera kostnaðin og ágóðan av íløguni. Haraftrat eru børn í Funningi í dagrøkt í Funningsfirði.

Í Funningi búgva 81 fólk. Har er lítil og eingin fráflyting. Fyri 15-20 árum síðan var fólkatalið eini 110-115. Tey, sum eru farin burtur av, eru deyð av elli.

Barnaskúli er í bygdini; har ganga eini 8-9 børn. Framhaldsdeildini hevur verið í Felagsskúlanum á Oyrarbakka, men nú skúlin har stóð fyri stórum íløgum, helt Funnings kommuna ikki, at nøkur meining var í at bera hesar útreiðslur saman við hinum kommununum, tí barnatalið í Funningi minkar alsamt.

Framhaldsdeildin hjá børnunum í Funningi verður tískil hereftir í Runavíkar skúla.

– Einir tveir næmingar gera skúlan lidnan á Oyrarbakka, og síðan byrja tey, sum fara úr barnaskúlanum í Funningi, í Runavíkar skúla. Higartil er ein næmingur byrjaður í Runavíkar skúla, og tað vísir seg at rigga væl, sigur Jóan Petur.

Hann vísir á, at ein onnur orsøk til, at Funnings kommuna hevur valt at samstarva við Runavíkar kommunu um skúlan, er henda:

– Kemur ein tvungin samanlegging uppá tal, hava vit við samstarvinum um skúlan eitt bein úteftir aftrat, sigur bygdarráðsformaðurin.



*Runavíkar kommuna noyðist eftir øllum at døma at brynja seg við toli – eftir at fáa Funnings kommunu uppí stóru kommununa í Eysturoy*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

### Ber væl til

Jóan Petur er tó sannførdur um, at tað ber væl til hjá kommunum at samstarva, hóast tær ikki er lagdar saman í eina kommunu.

Í hesum sambandi vísir hann á tað samstarv, sum er við Elduvíkar kommunu um bátahyl og dagrøkt og nú við Runavíkar kommunu um skúla og koyring.

– Sum vit hava skilt á nýggja landsstýrismanninum í almannamálum, Hans Paula Strøm, er neyvan væntandi, at eldraøkið verður lagt út til kommunurnar at umsita tey fyrstu árini.

Tí dugir Jóan Petur Johannesen, bygdarráðsformaður í Funningi, ikki at síggja, at nøkur orsøk er til at fremja eina samanlegging í skundi, nú bert hálvt ár er eftir til kommunuval.



**UTTAN ÚR HEIMI**

# USA vil hava fleiri lond til Irak



*USA vil hava onnur lond at senda hermenn til Irak, men landið ætlar framvegis at hava sínar hermenn har*
*Mynd: Reuters*

**Amerikanska stjórnin vil hava eitt fleirtjóðað herlið til Irak, tá iarakar taka við valdinum í landinum. Summi lond ivast**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Amerikanararnir royna nú at fáa fleiri lond at senda herfólk til Irak.

Í einum uppskoti, sum amerikanska stjórnin hevur lagt fyri trygdarráðið hjá ST, verður skotið upp, at eitt fleirtjóðað herlið skal hjálpa irakum at halda skil á, eftir at irakar sjálvir taka við valdinum í landinum tann 30. juni.

Samstundis hevur George W. Bush, forseti, gjørt greitt, at teir amrikonsku hermenninir verða verandi í Irak, so leingi tørvur er á tí. USA hevur í løtuni 130.000 hermenn í Irak, og sambært Bush skulu amerikanararnir framvegis hava eftirlit við iraksku løgregluni og landsins trygdardeildum. Tað er eisini eitt amerikanskt krav, at ein amerikanskur generalur skal standa á odda fyri fleirtjóðað deildini.

Fleiri lond í trygdarráðnum ivast í amerikanska uppskotinum, tí tey seta spurnartekin við, hvussu stórt vald irakar í veruleikanum fáa, um amerikanararnir framvegis skulu hava ein so týðandi leiklut í landinum.

Colin Powell, uttanríkisráðhari, segði um vikuskiftið, at USA fer at taka sínar hermenn úr Irak, fær landið boð um tað frá teirri komandi iraksku stjórnini. Hann legði tó afturat, at USA væntar ikki at fáa slík boð.

# 16 ára gamal ætlaði at søkja at skúlanum

**Ein 16 ára gamal drongur í svenska býnum Malmø ætlaði at beina fyri sínum skúlafeløgum og lærarunum**

SVØRÍKI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Sambært svenskum bløðum høvdu tann 16 ára gamli drongurin og nakrir av vinmonnum hansara lagt eina neyva ætlan um, hvussu teir skuldu beina fyri nøkrum ávísum næmingum og lærarum í einum skúla í Malmø. Sydsvenska Dagbladet skrivar, at dreingirnir ætlaðu sær at nýta spreingievni, og at teir ætlaðu at beina fyri sær sjálvum aftaná.

Tveir dreingir, sum høvdu lagt ætlanina saman við tí 16 ára gamloa, hava greitt løgregluni frá ætlanini, og teir eru latnir leysir. Tann 16 ára gamli hevur harafturímóti avsannað, at hann var uppií, og hann er tí varðhaldsfongslaður í tríggjar vikur.

Løgreglan í Malmø ivast ikki í, at drongurin var høvuðsmaður aftan fyri ætlanina. Heima hjá dronginum hevur løgreglan funnið eina byrsu og ymisk evnafrøðilig evni, sum kunnu nýtast til bumbur. Í telduni hjá dronginum fann løgreglan eina ætlan um,. nær og hvussu atsóknin skuldi setast í verk.

Tann 16 ára gamli hevur verið í holt við myndugleikarnar fyrr. Eitt nú er hann skuldsettur fyri stuldur og harðskap.

Játtar tann 16 ára gamli seg sekan, verður hann eftir øllum at døma latin leysur, tí hann er so ungur, skrivar svenska tíðindastovan TT.

# Vælferðin ov dýr

**Verður danska vælferðarsamfelagið ikki broytt, noyðast danir at gjalda munandi meiri skatt**

Vælferðarnevndin, sum danska stjórnin hevur sett at endurskoða donsku vælferðarskipaninar, sigur, at danir kunnu ikki varðveita ta vælferð, teir hava nú. Jú, teir kunnu, men so mugu teir gjalda munandi meiri fyri vælferðina enn nú.

Nevndin sigur, at verða skipaninar ikki broyttar, noyðast eini hjún við arbeiðarainntøku at gjalda 35.000 krónur meiri í skatti um árið í 2011 enn nú.

Skal sleppast undan tí, skulu danir spara 54 milliardir krónur í almennu útreiðslunum um árið í komandi árum. Tað svarar til tað, sum alt tað danska heilsuverkið kostar um árið.

áj

## Ebola komið til Sudan

Tað borgarakrígsherjaða afrikanska landið Sudan hevur fingið eina ringa plágu afturat.

Heimaheilsustovnurin hjá ST, WHO, hevur staðfest, at fólk har suðuri í Sudan hava fingið ta lívshættisligu sjúkuna Ebola. Fyribils eru 15 tilburðir staðfestir, og fýra fólk eru deyð av sjúkuni. WHO stúrir fyri, at uppaftur fleiri hava fingið sjúkuna. Víst verður á, at tað er trupult at staðfesta, nær fólk gerast sjúk, og at vanliga verður sjúkan ikki staðfest, fyrr enn fólk fara at bløða, og tá kann tað vera ov seint.

Tað kemur stak illa við, at ein so hættislig sjúka er farin at gera um seg í Sudan. Frammanundan hava umleið 350.000 fólk har ov lítið til matna, og fleiri hundraðtúsund eru flýdd frá húsi og heimi undan borgarakrígnum. Mong teirra eru f´ydd til grannalandið Tjad. ST heldur, at kríggið hevur kostað umleið 30.000 mannalív tey bæði seinastu árini.

## Vandu morð

Skjøl í savninum hjá gomlu eysturtýsku trygdartænastuni Stasi vísa, at tíðliga í sjeytiárunum vóru umleið 200 vesturtýskir kommunistar á venjingarlegu í Eysturtýsklandi.

Á venjingarlegunum fingu tey venjing í fría gíslar og at beina fyri afturhaldssinnaðum persónum vestanfyri. Tey 200 vóru limir í vesturtýska kommunistaflokkinum, sum bleiv stovnaður í 1968, og sum var grundaður á tann gamla kommunistaflokkin, sum bleiv bannaður í 1956. Skjølini hjá Stasi vísa, at limirnir í vesturtýska kommunistaflokkinum fingu venjing í Kekkoslovakia og Ungarn, men at venjingin seinni bleiv samskipað í Eysturtýsklandi. Talan var í veruleikanum um eina vápnaða deild.

Sambært blaðnum Frankfurter Allgemeine Zeitung vistu teir týsku myndugleikarnir einki um ta vápnaðu kommunistisku deildina fyrr enn í fjør, tá ein limur í einum eysturtýskur drápsmannaliði bleiv tikin.

## Ber neyvan til

Kendi amerikanski professarin Ian Shapiro heldur ikki, at tað fer at eydnast amerikanarunum og teirra sameindu at skipa Irak sum eitt demokratiskt samfelag.

Við norska blaðið Aftenposten sigur hann, at tað ber til at umskipa eitt samfelag frá einaræði til demokrati, men hann ivast kortini í, at tað letur seg gera í Irak. Hann vísir á, at ein fyritreyt fyri at demokratisera eitt samfelag er, at samfelagið hevur tær neyðugu demokratisku skipaninar, og tað hevur Irak ikki. Ian Shapiro sigur, at USA hevur í stóran mun ábyrgdina av, at tær neyðugu skipaninar ikki eru til staðar í Irak.

Amerikanski professarin sigur, at aftan á seinna heimsbardaga vísti tað sera at vera neyðugt at varðveita ein part av teimum gomlu skipanunum í Týsklandi og Japan, tá londini vórðu umskipað til demokrati. Á hesum øki hava amerikanararnir verið sera klossutir í Irak, sigur Ian Shapiro.

## Hávar ræða brasilar

Granskarar í Brasil ávara nú um, at fólk, sum svimja fram við strondini, skulu vera serliga varin, tí hávarnir tykjast vera serliga ágangandi í ár.

Seinasta vikuskiftið vórðu tvey fólk í Brasil álopin av hávi. Uttan fyri býin Jaboatao de Guarapes misti ein 17 ára gamal drongur vinstru hond og vinstra fót, tá ein hávur leyp á hann. Dagin eftir leyp ein hávur á eina 24 ára gamla kvinnu, men einki er sagt um, hvønn skaða hon fekk.

Brasilskir granskarar siga, at hávarnir har norðuri við brasilsku strondina hava verið serliga ágangandi í ár. Teir vísa eisini á, at hávarnir eru komnir sjáldsama nær landi, og at teir javnan koma inn á rættiliga grunt vatn. Higartil í ár hava hávar lopið á fimm fólk, og myndugleikarnir siga, at heldur hetta fram, verður árið í ár líka ringt sum 1994, tá ellivu fólk í Brasil vórðu álopin av hávi.